GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

viðvíkjandi stólum til matstovuna á Gjaldstovuni

September 2024

# Innihald


1 Innleiðing ... 3

2 Kontaktpersónur ... 3

3 Vavi á útboði ... 3

4 Mannagongd og krøv ... 3

4.1 Lýsing og krøv til stólar ... 3

4.2 Mannagongd ... 4

4.3 Tíðarætlan ... 4

4.4 Tillutan og vekt ... 5

4.5 Dómsnevnd ... 5

5 Viðstøða, fyrivarni, alment innlit og ogn ... 5

5.1 Viðstøða ... 5

5.2 Fyrivarni ... 5

5.3 Alment innlit ... 5

5.4 Ogn ... 6

5.5 Havnan av tilboðum ... 6

# 1 Innleiðing

Við hesum skrivi ynskir Gjaldstovan við Keypsportalinum at biðja um tilboð upp á stólar til matstovuna í Albert Hall.

Útboðið verður gjørt sambært "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum".

Útboðstilfarið inniheldur afturat hesum skjali eisini skjølini

- Útboðsskjal
- Fylgiskjal 1 - prísskjal
- Fylgiskjal 2 - Trú og heiður váttan
- Fylgiskjal 3 - dømir um stólar
- Fylgiskjal 4 - myndir av matstovu.

# 2 Kontaktpersónur

Útbjóðari er Gjaldstovan við Keypsportalinum. Kontaktpersónur er: Kim Hansen, fulltrúi, kim@gjaldstovan.fo, +298 281581.

# 3 Vavi á útboði

Biðið verður um tilboð uppá 72 stólar, ið eru væl egnaðir til matstovur. Sí lýsing og krøv niðan niðanfyri.

# 4 Mannagongd og krøv

## 4.1 Lýsing og krøv til stólar

**Minstukrøv**

Stólarnir skulu

- lúka DS krøv (Dansk standard), tá tað snýr seg um tilfar, lakk og málaraviðgerð, brunakrøv, styrki og stabilitet
- kunna stáplast
- hava røttu sitihædd til spísiborðini í matstovuni. Talan er standard mát, sí annars myndir av matstovuni.

Tilboð, ið ikki liva upp til minstukrøv, verða avvíst.

**Krøv til góðsku**

Tá mett verður um góðskuna av stólunum, so verður dentur lagdur á fylgjandi:

- hvussu væl teir passa saman við verandi innbúgvi, sí myndir av matstovuni
- tilfar og litir
- styrki og komfort
- virkisføri, viðlíkahald og reingerð

Dømi um stólar, ið uppfylla krøvini, eru í skjalinum við myndum av stólum, ið eru góðkendir.

## 4.2 Mannagongd

Tilfarið skal vera stutt og greitt og ikki fleiri enn 6 síður. Veitarin skal við teksti og myndum lýsa stólarnar væl. Umráðandi er, at myndir og tekstur eru í sama arki.

Prísurin skal setast inn í "Fylgiskjal 1 - prísskjal" og "Fylgiskjal 2 - Trú og heiður váttan"

skal fyllast út.

Er áhugi fyri tí, verða hølini víst fram. Av praktiskum ávum er neyðugt at boða frá tveir dagar fyri framvísing.

Spurningar kunnu setast til tilfarið og skulu sendast til kontaktpersónin. Svarini verða dulnevnd og løgd á Keypsportalin so hvørt.

## 4.3 Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Tilboðsfyrispurningur á Keypsportalin | 18. september 2024 |
| Framvísing av hølum | 27. september 2024, kl. 14:30 |
| Spurnarfreist | 2. oktober 2024 |
| Tilboðsfreist | 9. oktober 2024, kl. 16:00 |
| Avgerð og kunngerð av vinnara | 18. oktober 2024 |
| Levering og uppseting | 20. november 2024 |

### 4.4 Tillutan og vekt

Vekting, kostnaður 50% og góðska 50%.

Viðvíkjandi kostnaðinum. Øll góðkend tilboð fáa ein karakter frá 0 til 10 eftir frymlinum:

$$10 * \frac{\text{Lægsta prís}}{\text{Hægsta prís}}$$

Viðvíkjandi góðsku. Øll tilboð fáa ein karakter í mun til góðskukrøvini lýst omanfyri. Raðfylgjan hevur ongan týdning, og tillutaður verður ein karakterur frá 0 til 10, ið byggir á eina heildarmynd.

Tilboðið við hægsta karakteri, eftir at hann er vektaður 50/50 fyri ávikavist prís og góðsku, vinnur útboðið.

Vinnari og samlaði kostnaðurin verður kunngjørdur á Keypsportalinum.

Fyri at sleppa undan stólum, ið ikki kunnu nýtast, verða øll tilboð, har stólarnir fáa karakterin 3 ella lægri avvíst, óansæð prís.

### 4.5 Dómsnevnd

Dómsnevnd, mannað av umboðum frá Gjaldstovuni, metir um góðskuna á vøruni. Er neyðugt, verður serkunnleiki brúktur at hjálpa til við dømingini.

## 5 Viðstøða, fyrivarni, alment innlit og ogn

### 5.1 Viðstøða

Innkomin tilboð skulu standa við í 3 mðr. eftir at tilboðsfreistin er farin.

### 5.2 Fyrivarni

Tann, ið letur inn tilboð, eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið. Eitthvørt fyrivarni viðførir, at útbjóðari kann vísa burtur innlatið tilboð.

### 5.3 Alment innlit

Tann, ið letur inn tilboð, skal eisini vera varur við, at Gjaldstovan er fevnd av lógini um alment innlit: “Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina”

## 5.4 Ogn

Øll innkomin tilboð við fylgiskjølum eru ogn hjá Gjaldstovuni, og verða ikki send aftur til tilboðsgevara.

## 5.5 Havnan av tilboðum

Gjaldstovan tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. Gjaldstovan tilskilar sær eisini rætt til at havna einum tilboði (sum um talan var um undangóðkenning), um vøran á órímiligan hátt ikki livir upp til góðskuna, sniðið og virkisførið, ið Gjaldstovan brúkar í dag.